# Monica spøkir aftur

Navnið á Monicu Levinsky er nú nevnt í forsetavalstíðnum í USA. Sjálv hevur tann nú 34 ára gamla Monica ikki sagt eitt einasta orð í valstríðnum, men navn hennara er komið fram, tí dóttir Hillary og Bill Clinton, tann 28 ára gamla Chelsea, varð nú um dagarnar spurd, hvørja ávirkan sambandið millum fyrrverandi forsetan og Monicu hevði á Clinton-húskið. Tað var týðiligt, at Chelsea var alt annað enn fegin um spurningin, og hon svaraði eisini stutt: "Tað kemur ikki tær við". Hetta er ikki fyrstu ferð, at Chelsea fær hendan spurningin, og hevur hon altíð svarað, at hetta er eitt innanhýsis mál, sum ikki kemur øðrum við.





# 54 fólk kvald í frystibingju

Tað var ein óhugnalig sjón, sum møtti teimum teilendsku løgreglumonnunum, sum skuldu kanna eina frystibingju, sum var komin úr grannalandinum Burma. Á dúrkinum í bingjuni sótu og lógu 121 fólk, og kanningar vístu, at 54 teirra vóru deyð av lufrtroti. Bingjan, sum hevur verið brúkt til at flyta frystan fisk í, var seks metrar long og lufttøtt.

# Grannaráðstevna um Zimbabwe

**Í morgin fara grannalondini hjá Zimbabwe at tosa um, hvussu tann politiska kreppan har kann loysast**

ÚTLOND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Higartil hava grannalondini hjá Zimbabwe ikki lagt seg beinleiðis út í stríðið millum stýrið hjá Robert Mugabe, forseta og andstøðuna um úrslitið av valinum næstsíðsta vikuskiftið.

Formaðurin í suðurafrikanska stjórnarflokkinum ANC, Jakob Zuma, er tann einasti leiðandi politikarin í grannalondunum, sum hevur fýlst á, at valnenvdin í Zimbabwe ikki hevur kunngjørt úrslitið enn. Suðurafrikanski forsetin, Thabo Mbeki, hevur harafturímóti biðið partarnar geva tol, og hann hevur mælt altjóða samfelagnum frá at leggja seg út í málið.

Nú er kortini líkt til, at myndugleikarnir í Zambia vilja hava eina loysn á kreppuni í Zimbabwe, og eftir áheitan frá zambiska forsetanum, Levy Mwanawasa, hittast londini í suðurafrikanskamenningarfelagsskapinum til kreppufundar um støðuna leygardagin. 14 lond er í hesum felagsskapi.

- Tað er neyðugt, at alt økið samstarvar fyri at fáa eina loysn á kreppuni, sigur zambiski forsetin við BBC.

# Vænta fleiri ódnir í ár

**Granskarar á lærda háskúlanum í Colorado í USA vænta heldur fleiri ódnir í Atlantshavinum í ár enn higartil mett**

Granskaraliðið í Colorado, sum er undir leiðslu av einum av teimum fremstu granskarunum á hesum øki, Bill Gray, sigur nú, at teir tropisku stormarnir og tær tropisku ódnirnar í Atlantshavinum verða heldur fleiri í ár enn higartil mett.

Bill Gray og hansara fólk vænta 15 tropiskar stormar í ár, og at átta teirra fara at menna seg til tropiskar ódnir. Í meðal eru 10 tropiskir stormar og seks ódnir í Atlantshavinum um árið. Granskararnir á Colorado State University siga, at tað er 69 prosent sannlíki fyri, at tær harðastu ódnirnar fara at raka land.

Hóast ódnirnar væntandi verða fleiri enn higartil mett, eru tær fáar samanborið við 2005. Tað árið vóru 28 tropiskir stormar, og ein teirra endaði sum ódnin Katrina. At stormarnir verða so nógvar í ár kemst sambært amerikonsku granskarunum av, at La Ninastreymurin í Kyrrahavinum viknar, og at eystari partur av Atlantshavinum verður heldur heitari enn vanligt.



# Narkotika til føroys

**Maðurin, sum alla hesa vikuna er til viðgerðar í Føroya Rætti í stóra rúsevnamálinum, hevði rúsevni í bilinum, sum kundu verðið seld á gøtuni í Føroyum fyri 5,1 milliónir og keypararnir høvdu í høvuðsheitum verið ungfólk**

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hevði ein maður selt øll tey rúsevnini í gøtuni í Føroyum, sum hann hevði fingið hendur á, hevði tað gjørt hann til milliónings - fleiri ferðir.

Tað er komið fram í stóra narkotikamálinum, sum hevur verið til viðgerðar í einum nevningatingi í Føroya Rætti alla hesa vikuna.

Maðurin er ákærdur fyri at hava varðveitt yvir 24 kilo av amfetaminpulvuri og sløk 15 kilo av ekstasypulvuri fyri tveir íslendskar smuglarar í eina góða viku í september í fjør.

Teir báðir komu til Føroyar í einum stuttleikabáti og ætlanin var, at evnini skuldu smuglast víðari til Íslands.

Men tá ið teir báðir íslendsku smuglararnir fóru av aftur landinum, lótu teir tveir ryggsekkir við rúsevnum verða eftir hjá tí ákærda í Føroyum.

Talan var um 796 gramm av amfetamini og 982 gramm av ekstasypulvuri.

Ekstasypulvuri, sum talan er um, eru nóg mikið til at gera yvir 14.000 miðal sterkar tablettir burturúr.

Men verður tað blandað veikari, fáast sjálvandi nógv fleiri tablettir burturúr.

Í einum grammi av amfetamini eru 3-4 "banar", sum tað eitur á fakmáli og leyðsliga mett høvdu tey 796 grammini av amfetamini sostatt verið nóg mikið til einar 3000 "banar".

Ákærdi goymdi evnini í bilinum, men løgreglan legði hald á tey, tá ið bilurin varð rannsakaður.

## Seljast fyri 5,1 milliónir

Undir rættarmálinum hevði ákærin gjørt sær ómak at víst nevningunum, hvussu stórt virði hendan nøgdin av narkotika hevði havt á svarta marknaðinum í Føroyum.

Í hesum sambandi bygdi ákærin sínar metingar á upplýsingar frá narkodeildini hjá løgregluni. Alt hetta bygdi sostatt á upplýsingar, sum løgreglan kom fram á í sínum kanningum og tað, sum løgreglan hevði lagt hald á og sjálvandi eisini tað, sum hon annars visti um hetta virksemið í Føroyum.

Og ákærin segði, at hevði øll hendan mongdin av rúsevnum verðið seld á gøtuni í Føroyum, hevði søluprísurin verið góðar 5,1 milliónir krónur.

Hon vísti á, at tað er nógv dýrari at keypa rúsevni á svarta marknaðinum í Føroyum enn tað er at keypa á gøtuni í okkara grannalondum.

Í Føroyum kostar ein ekstasy tablett ímillum 300 og 350 krónur og eitt gramm av amfetamini kostar 700-800 krónur.

Í Danmark er prísurin á amfetamini 100-300 krónur fyri grammið, alt eftir hvar í landinum tað er og ein ekstasytablett kostar 30-150 krónur.

Men prísurin á hvørjari tablett kann fara heilt niður í 8-12 krónur fyri hvørja, tá